Ársins Rósa:

# Eitt herðaklapp til tey hjartagóðu

**Í sambandi við at jólaskipið kemur til Klaksvíkar ein av døgunum beint upp undir jól, hava fyrireikararnir tikið stig til, at Ársins Rósa skal latast einum persóni, sum dagliga ger eitt stórt og ókeypis arbeiði, hugsar um onnur og er har, tá harðast leikar á hjá familjum og einstaklingum**

ÁRSINS RÓSA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, fer at handa Ársins Rósu í sambandi við røðu sína, tá jólaskipið kemur til Klaksvíkar ein av døgunum beint upp undir jól*

*Savnsmynd*

**Klaksvík:**
Sum mótkandidatur til Ársins neyðrakett hjá Dimmalætting hava fyrireikararnir av Jólaskipinum, Norðlýsið og Klaksvíkar kommuna við borgarstjóranum á odda tikið stig til at lata Ársins Rósu til ein persón ella ein bólk, sum hava gjørt eitt megnararbeiði í tí stilla við stuðuli og øðrum til onnur, ið líða neyð á ein ella annan hátt.

Hetta átakið er ógvuliga líkt Månedens buket hjá danska sjónvarpslæknanum, Peter Qvortrup Geisling, sum vitjaði í Føroyum fyrr í ár.

Niklas Heri Jákupsson, sum er ein av fyrireikarunum til Jólaskipið sigur, at hann so mangan hevur havt tað á orðið, at man átti at gjørt eitt tílíkt árligt átak fyri at rósa fólki og geva eitt hart tiltrongt herðaklapp.

– Vit onnur seta sjálvandi stóran prís uppá slíkt arbeiði, men eru kanska ikki so ógvuliga røsk at vísa teimum, ið arbeiða í tí stilla, at tey eiga okkara stuðul, og at vit virðismeta tað tey gera, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.

## Borgarstjórin handar

Ætlanin er, at hendan handanin skal vera í samband við røðuna hjá borgarstjóranum í samband við "Jólaskipið". Tann, ið verður kosin Ársins Rósa, fær eina stóra flotta kurv og eina silvurlagda rósu.

Fyribils arbeiðir ein nevnd, mannað við Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri sum formanni, einum umboði frá Jólaskipinum, blaðstjóranum á Norðlýsinum og einum umboði afturat úr býráðnum við hesum tiltakinum. So er ætlanin at tann, ið fær Ársins Rósu eisini skal upp í nevndina, so tann sessurin verður skiftur út á hvørjum ári.

– Tað verður kommunan, sum kemur at taka sær av hesum. Jólaskipið verður bert ein partur av nevndini, sigur Niklas Heri Jákupsson.

Í tíðindaskrivinum verður eisini sagt, at hugsanin aftan fyri Ársins Rósu er ein roynd, at venda tonkunum hjá øllum til tey mongu, sum eru stuðlar undir samfelagi okkara, men sum vit mangan gloyma, nú alt skal ganga so skjótt, og vit ongantíð halda okkum hava nóg mikið av tíð í tí dagliga.

Ársins Rósa verður ongantíð givin til øll tey mongu fyrimyndarligu fólkini, ið fara fram í stillum við sínum stóra arbeiði, men hon kann vera við til at venda hugsanunum hjá øðrum til teirra í minsta lagi einaferð um árið.

## Uppskot sendast inn

Fyrireikararnir vilja við hesum biðja borgarar í Klaksvíkar kommunu um at senda uppskot inn um, hvør eigur at fáa Ársins Rósu 2004.

– Vit fara at hava okkara egnu uppskot, men vit vilja fegin hava onnur við, tí tað kann vera so skjótt, at vit gloyma onkran, sum veruliga hevur uppiborið Ársins rósu, sigur Niklas Heri.

Tey, ið hava hug at senda uppskot inn, kunnu bara skriva nøkur fá orð, har navn á viðkomandi, sum man heldur átti at fingið Ársins Rósu 2004 er á og greiða eftir førimuni frá í stuttum, hví tú heldur at viðkomandi skal hava Rósuna.

Brævið kann sendast til: Ársins Rósa, boks 58, 700 Klaksvík.

# Drúgv ferð um Leirvíksfjørð

**Klaksvík:**
Dúgvan fór úr Klaksvík týsmorgunin klokkan 5.45, men tá komið var til Leirvíkar, var so mikið av vindi, at skiparin gjørdi av ikki at fara inn um grótkastið og heldur venda aftur til Klaksvíkar. Ferðafólkini fingu at vita, at skipið fór av aftur Klaksvík til vanliga tíð, klokkan 7.15 og tá til Fuglafjarðar, um veðrið ikki var batnað í Leirvík.

Hann øtlaði vindin nakað tann seinna túrin, og ein hvirla tók dygt í skipið, tá tað var komið nakað út um Klakkin. Nógv datt av hillunum og fór sendandi í dúrkið. Og tað tóktiskt nakað ógvusligt einu løtuna. Men tað var tíbetur bert tann eina hvirlan. Hetta var tó nóg mikið til at leypa hvøkk í fleiri av ferðafólkunum, sum vóru við.

Alt spældi tó væl av, og Dúgvan legði at í Fuglafirði í øllum góðum beint áðrenn klokkan 8.30. Øll vóru glað, men tað vardi ikki so longi, tí tað var so bratt av rampanum niður á kaiina, at eina løtu var ivasamt, um bilarnir fóru at kunna koyra í land.

Dugnaliga manningin fekk tó riggað tað soleiðis til, at bilarnir eftir einari løtu kundu koyra í land, og so var túrurin um Leirvíksfjørð av. Fyri nøkur av ferðafólkunum hevði hann tá vart í tríggjar tímar. Dúgvan sigldi aftur til Klaksvíkar og gjørdi ikki nakra nýggja roynd fyrr enn klokkan 11.45.

**-sae-**

merko JÓLAKALENDARIN

*Mikudagur 15. desember 2004*

*MAREN FROST*
*kjøt- & mjølbollar*
*1 kilo*



24,95

*SUPER suppuurtir*
*1 kilo*



8,95

*FINE TASTE*
*mini flütes*
*15 stk.*



12,95



SPURNINGUR

Hvør hevur skrivað bókina. "Dreingirnir í Waffen SS" ?

Tilboðið er bert galdandi mikudagin 15. desember.

SVAR

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum

NAVN & TELEFON NUMMAR